# Ólavsøkan longur oman í býin

## Umframt sjálvan miðbýin verða Tórsgøta, Vágsbotnur og Skálatrøð karmur um ein stóran part av ólavsøkuni í ár




2010

*Bogi Andreasen*

*Mynd: Birgir Waag Høgnesen*

Sum liður í at gera Tórsgøtu til mentunargøtu í býnum saman við Torginum í Vágsbotni, verða nógv av ólavsøkutiltøkunum flutt longur oman í býin, sigur Bogi Andreasen, sum er ein av fyriskiparunum av ólavsøkutiltøkunum.

Ólavsøkan byrjar við sjálvari Ólavsøkukonsertini, á parkeringsøkinum yvirav Reinsarínum í Tórsgøtu, týskvøldið 27. juni kl. 20. Sum partur av konsertini verður skipað fyri onkrari konsert á Reinsarínum í steðginum, eins og Underbeet, sum er eitt konsept við alternativum elektroniskum tónleiki, hevur diskotek við Kasper Bjørke í Perluni.

Á parkeringsøkinum í Tórsgøtu verður eisini okkurt fyri børnini báðar ólavsøkudagarnar.

Frá á midnátt 28. juli skipar Undirbeat fyri diskoteki við JamesJames & Übernörd í Perluni.

Í Perluni verður eisini Ævintýraferðin hjá Dánjali á Neystabø og Búa Dam við barnasjónleiki og tónleiki framførd frá 28. juli til og við 31. juli, allar dagarnar frá kl. 16-18. Á Tjóðpalli Føroya sýnir leikbólkurin Grugg leikin "Goym moralin til seinni". Tvær sýningar verða ólavsøkuaftan og tvær ólavsøkudag, tann fyrra kl. 18 og tann seinna kl. 22.

Nógv tiltøk verða eisini á Vaglinum. Eins og í fjør verður Tórspallur karmur um fleiri ymisk tónleikatiltøk, og í Tinghúsgarðinum verður kaffi og grillmatur at fáa.

Á Skálatrøð skipar Tórshavnar Ítróttarráð fyri ymiskum tónleikatiltøkum í teltinum. Eisini verða hoppiborgir, kaffisølu og nógv ymiskt annað. Umframt tiltøkini á Skálatrøð hevur Tórshavnar Ítróttarráð eisini básar við Føroya Banka í Steinagøtu.

mg

# Merkisdagar

### Gullbrúdleyp

Fríggjadagin 23. juli hava Hergerð og Eiler Samuelsen bakari Klaksvík gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í K.F.U.M & K í Klaksvík frá kl 19 har øll eru hjartaliga vælkomin.

### Gullbrúdleyp

Tann 23. juli eru liðin 50 ár síðani Katrin og Alex Sólstein vórðu hjúnavígd í Klaksvíkar kirkju. Tey eru burturstødd gullbrúdleypsdagin, tí saman við dreingjunum og familjum teirra endurtaka tey brúdleypsferðina til Noregs fyri fimmti árum síðani.

### Silvurbrúdleyp

Týsdagin 20. juli hava Malan og Jan Erik Klein Olsen, Klaksvík, silvurbrúdleyp. Opið hús heima á Hamarsniðið 20 frá kl. 17.00

### Silvurbrúdleyp

Týsdagin 17. august hava Jónleyg og Fríðálvur Bláhamar Vestmanna silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 21. august frá kl 12 til 18 í ítrottarhøllini í Vestmanna. Tey, ið ynskja at gleðast saman við okkum, verða vinaliga biðin um at siga frá innan 4. august á tlf 424407.

### 90 ára føðingardagur

Leygardagin 24. juli heldur Elisabeth Olsen sín 90 ára føðingardag á Sandáarbreyt 7. Tey, ið vilja heilsa upp á hana, eru hjartaliga vælkomin millum kl. 11 og 15.

### 90 ára føðingardagur

Mánadagi 26. juli verður Hanna Ziska, Klaksvík, 90 ár. Føðingardagurin verður hildin á Sjómansheiminum í Klaksvík kl. 18 sama dag. Tey, ið vilja heilsa upp á Honnu, eru hjartaliga vælkomin.

### 75 ára føðingardagur

Mánadagin 19. juli fyllir Daniella Olsen, Hósvík, 75 ár. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum sunnudagin 18. juli frá kl 17. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### 70 ára føðingardagur

23. juli fyllir Anna Glyvradal, Glyvrar, 70 ár. Vælkomst verður í sjókafeiini í Rúnavík 24. juli kl. 18.

## Andlát

Ætt, vinum og kenningum verður gjørt kunnugt, at kæra fastur okkara **Nanly Breckmann**, Tórshavn, andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin, 84 ára gomul. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum týsdagin kl. 16.00.
Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum mikudagin kl. 13.00.

***Bróðurbørnini***

## Andlát

Kunngjørt verður fyri ætt vinum og kenningum, at kæri maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara **Trygve Strøm**, ættaður av Tvøroyri búsitand í Tórshavn, andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin 78 ára gamal.

Kistan fer úr Ladssjúkrahuskapellinum týskvøldið kl. 18.00

Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum mikudagin kl. 15.00

***Familjunar vegna, Rosa við Fam.***

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum, ið vóru við til at gera 90 ára føðingardag mín so góðan og minnisríkan. Takk til tykkum øll, ið komu heim at heilsa uppá meg, takk fyri gávur og heilsanir, og takk til tykkum, sum hjálptu til á ymiskan hátt. Jesus signi tykkum øll.

**Nella Heinesen**
*( í Hoygarðinum )*
*Toftir*